# ST-SÁTTMÁLIN UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

LÓGARTÆNASTAN
2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 15**

# ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Føroyar hava tikið undir við fleiri altjóða mannarættindasáttmálum, sum altíð eiga at havast í huga, tá arbeitt verður við lógarsmíði. Millum hesar sáttmálar er ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek (Breksáttmálin), sum Føroyar tóku undir við í 2009.

Yvirskipaða endamálið við Breksáttmálanum er sambært grein 1 at fremja, verja og tryggja møguleikarnar hjá fólkum við breki at kunna nýta fullan ágóða av mannarættindum og grundleggjandi frælsisrættindum – á jøvnum føti við øll onnur – og at fremja virðingina fyri teirra íborna virði.

Fólk bera brek, tá tey hava varandi kropslig, sálarlig, vitborin ella kenslulig virkistarn, sum í samvirkan við ymsar aðrar forðingar kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu luttaka í samfelagslívinum á jøvnum føti við øll onnur.

*1.1. Altjóðarættarligu skyldur Føroya sambært Breksáttmálanum*
Við at samtykkja Breksáttmálan hava Føroyar átikið sær eina altjóðarættarliga skyldu til at halda sáttmálan. Hetta merkir millum annað, at føroysk lóggáva skal vera í samsvari við sáttmálan. Tað eigur tí at verða tryggjað, at nýggj lóggáva altíð er í samsvar við sáttmálan, og at lóggáva, sum er í stríð við sáttmálan, verður broytt.

*1.2. Eftirlit*
Fjórða hvørt ár skal Føroya landsstýri lata eina frágreiðing inn til eina ST-serfrøðinganevnd, ið hevur eftirlit við, at limalondini verkseta og halda sáttmálan. Føroyska frágreiðingin er partur av frágreiðingini hjá donsku stjórnini.

Á leið eitt ár eftir, at frágreiðingin er latin inn, skipar serfrøðinganevndin fyri einari hoyring, sum m.a. tekur støði í føroyska partinum av frágreiðingini og eini skuggafrágreiðing frá MEGD.

Stutta tíð eftir hoyringina almannakunnger serfrøðinganevndin sínar niðurstøður og síni tilmælir til Føroya landsstýri. Metir nevndin, at tað eru viðurskifti í m.a. føroyskari lóggávu, sum ikki eru nøktandi, verður víst á hetta í niðurstøðunum.

*1.3. Geiraábyrgd*
Breksáttmálin er m.a. grundaður á eina meginreglu um *geiraábyrgd*. Geiraábyrgd merkir, at ein myndugleiki, sum hevur ábyrgd at veita ávísar tænastur og veitingar, sum meginregla eisini hevur ábyrgd at tryggja, at somu tænastur og veitingar verða veitt fólki við breki.

Brekøkið hoyrir sostatt ikki undir eitt ávíst stjórnarráð, t.d. Almannamálaráðið.[1] Stjórnarráðini hava hvørji sær ábyrgd at tryggja, at lóggávan undir stjórnarráðnum samsvarar við Breksáttmálan.

*1.4. Innihaldið í Breksáttmálanum*

Breksáttmálin er, altjóða sáttmálum líkt, orðaður á sera yvirskipaðan hátt. Sáttmálin staðfestir eina røð av yvirskipaðum rættindum, men áleggur ikki limalondunum at fremja ítøkiligar broytingar, ella at seta nøkur ávís tiltøk í verk.

Breksáttmálin er heldur ætlaður sum eitt drívandi amboð, ið skal tryggja eina alsama menning av samfelagnum, samsvarandi meginreglunum í sáttmálanum, soleiðis at fólk við breki, í tann mun tað ber til[2], kunnu nýta fullan ágóða av teimum rættindum, sum sáttmálin staðfestir.

Limalondini hava tí eitt ávíst frælsi til at tulka Breksáttmálan og til at skipa lóggávuna og samfelagið eftir honum.

Rættindini hjá persónum við breki eru ásett í greinum 5-30 í Breksáttmálanum. Herímillum kunnu nevnast rætturin til atkomu[3] sambært grein 9, rætturin til at liva eitt sjálvstøðugt lív og at vera ein partur av samfelagnum sambært grein 19, rætturin til eitt privatlív sambært grein 22, rætturin til útbúgving sambært grein 24, rætturin til eitt heilsugott lív sambært grein 25, rætturin til at kunna arbeiða sambært grein 27, rætturin til at kunna luttaka í politiska lívinum sambært grein 29 og rætturin til at kunna luttaka í mentanarlívi, frítíðarlívi og ítrótti sambært grein 30.

*1.5. Breksáttmálin og lógarsmíð*

Rundskrivið um lógarsmíð ásetur, at eitt lógaruppskot *skal* lýsa, hvussu uppskotið samsvarar við Breksáttmálan.

Word-formurin (skabelónin), sum lógartænastan hevur gjørt til lógaruppskot, hevur tí eina serstaka yvirskrift til hetta endamálið.

Tá arbeitt verður við einum lógaruppskoti, skal stjórnarráðið tí meta um, hvørt uppskotið hevur avleiðingar fyri altjóðarættarligu skyldur Føroya sambært Breksáttmálanum.

Eitt dømi um eitt lógaruppskot, sum greiðir væl frá avleiðingunum av lógaruppskotinum í mun til Breksáttmálan, er Lm. Nr. 77/2024.

1 Almannamálaráðið hevur tó ábyrgdina at samskipa frágreiðingina til Brekrættindanevndina og føroyska leiklutin í sambandi við hoyringina.

2 Innan fyri teir karmar, sum samfelagsmenningin og samfelagsbúskapurin setur.

3 Atkoma skal skiljast í breiðari merking, t.v.s. ikki bara atkoma til bygningar, men eisini til ymiskar tænastur. Verkætlanin “Talgildu Føroyar” kann t.d. sigast at betra atkomuna hjá ymiskum persónum við breki til eina langa røð av tænastum.